# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sjálvandi lond og ikki øki

Í hesum døgum hevur Norðurlandaráðið fund í Svøríki. Hetta er árligi ráðsfundurin, har allar tjóðirnar, londini og økini í Norðurlondum luttaka.

Í hesum sambandi hevur Útnorðurráðið við grønlendska formanninum Josef Motzfeldt á odda heitt á Norðurlandaráðið og Ráðharraráðið um at strika orðingina ØKI, tá henda verður brúkt um fleiri av londunum í Norðurlondum.

Vit hava aftur og aftur hoyrt og sæð á skrift vendingina "sjálvstýrandi økini" brúkta um serstakliga Føroyar og Grønland.

Útnorðurráðið sigur í síni áheitan, at heldur enn at brúka orðingina "lond og sjálvstýrandi øki" eiga vendingarnar "ríki og lond" ella "statir og sjálvstýrandi lond" at verða nýtt, soleiðis at orðið lond ikki verður brúkt í einum týdningi, sum útilokar Føroyar og Grønland.

Vit kunnu bara taka fult og heilt undir við hesi áheitan. Orðið øki er bæði niðurgerandi og er ikki sørt eyðmerkt av hjálandaveldi. Grønland og Føroyar eru sjálvandi sjálvstýrandi lond og ikki øki. Latið tað vera sagt einaferð med alla. Við okkara serstøku mentanum, máli, søgu og geografi er als eingin ivi um, at talan er um lond.

Ein spurningur, sum eisini hevur verið reistur, eitt nú í svensku miðlunum í sambandi við Norðurlanda ráðsfundin er týdningurin, sum Norðurlond kunnu hava, um tey standa meira saman. M.a. verður víst á í blaðgrein, at Norðurlond eiga at standa so mikið nógv saman, at tey einaferð í framtíðini eiga at skipa seg sum eitt samveldi. Tá vilja tey sum ein felags eind standa nógv sterkari, ja entá verða tann felags eindin í heiminum, sum stendur nógv sterkast.

Her er sjálvandi ikki talan um vápn ella slíkt vald. Norðurlond eru kend fyri sínar sosialu- og heilsuligu skipanir og fyri eitt sera dynamiskt vinnulív. Fyri at ganga á odda í mannarættindaspurningum á nærum øllum økjum í samfelagnum. Eisini tá tað snýr seg um javnrættindi. Og ikki minst eiga Norðurlond ella rættari umsita tey nøkur av heimsins størstu virðum í havinum.

Spurningurin um eitt samveldi í Norðuratlantshavi hevur fyrr verið reistur. Eingin ivi um, at londini her eiga at menna samvinnuna, men um talan skal blíva um eitt samveldi er so nakað, sum má viðgerast í fólkavaldu tingunum. Málið verður so enn meira breitt og áhugavert, tá spurningurin um øll Norðurlond saman kunnu gerast til eitt samveldi. Ein gamal tanki, sum uttan iva er mongum norðbúgva nærliggjandi. Um ES hevur forkomið hesum møguleika er so ein annar spurningur. Men hví ikki taka hesar spurningar til umrøðu. Hvat uppskotinum um at strika øki og brúka orðingina land ístaðin, har er als einki at umrøða. Tað er ein sjálvfylgja.

**Sosialurin**

## Vaskikonan á Vesturbrúgv

JOHAN PETERSEN



**Tá loysingarmenn ongi argument vita sær mótvegis heildarveitingini úr Danmark, nýta teir ofta "tað er so synd í vaskikonuni á Vesturbrúgv"-syndromið sum argument móti blokkinum. Men er tað nú so synd í henni? Kann búskapurin í Føroyum yvirhøvur samanberast við búskapin í Danmark?**

Í eini roynd at vísa á, at vit føringar ikki eiga at taka móti heildarveitingini úr Danmark, nýtir Sigmundur Poulsen argumentið, at danir eru so illa fyri búskaparliga, og at vit tí ikki eiga at vera við til at leggja størri skattabyrðar á teir.

Hetta sigur hann sum viðmerking til stutta grein, har eg samanbar førisku loysingarrørsluna við íslendsku, nú íslendskur bókmentagranskari gevur íslendsku sjálvprísandi nationalromantisku frælsishugsjónini ábyrgdina fyri, at Ísland,og serliga at nógvir íslendingar eru komnir so illa fyri.

**Íslendingar mist pensjónsuppsparing og sita eftir við ovurhonds stórum lánum**

At Ísland hevur goldið limagjald til ST hjálpir lítið øllum teimum íslendingum, sum hava mist alla sína pensjónsuppsparing ella sita við lánum, sum knappliga gjørdust ovurhonds stór, orsakað av at tey vóru upptikin í fremmandum valuta og íslendska krónan endaði í fríum falli.

Men tað er nú sárt hjá loysingarmonnum, sum í nógv, nógv Harrans ár hava havt íslendska undurið sum fyrimynd, at tað vísti seg bert at vera ein sápubløðra. Tí flytur Sigmundur Poulsen fokus frá Íslandi til Danmarkar og sigur, hvussu synd tað er í dønum, tí teir skulu vera eins illa fyri sum vit føringar. Men passar tað?

**Loysingarflokkarnir skóru inn á bein í bestu tíðum**

Sigmundur hevur helst rætt, tá hann nýtir tøl frá Børsen, sum sigur, at hallið í danska búskapinum í 2009, 2010 og 2011 verður 179 mia. kr tilsamans, tí danska fíggjarlógaruppskotið bara fyri 2010 vísir eitt hall upp á 86 mia. kr. Hetta svarar upp á seg júst til hallið í føriska fíggjalógaruppskotinum. Men síðan heldur øll samanbering uppat.

Danska fíggjarkreppan stavar frá tí globalu kreppuni og er tann ringasta í Danmark seinastu 80 árini, meðan føriska í lika so stóran mun er orsakað av blokkniðurskurðinum, har loysingarflokkarnir skóru inn á bein í bestu tíðum. Kreppan er tann ringasta í Førjum seinastu 15 árini!

Danska fíggjarlógarhallið er blást upp, tí danir vilja pumpa nakað av uppsparda peninginum út í samfelagið fyri á tann hátt at fáa samfelagshjólini at mala skjótari aftur. Teir hava goldið út við bankapakka 1 og bankapakka 2 (kenna vit hetta aftur?), exportfígging, gera nýggjan sjúkrahúsreform við nógvum nýggjum supersjúkrahúsum osfr. osfr.

**Blokkurin hevði givið okkum balansa í fíggjarlógina**

Føriska fíggjalógarhallið er kroyst niður við sparingum innan øll málsøki, snøgt sagt tí vit mangla blokkniðurskurðin, sum saman við fastfrystingini er upp á yvir 400 mió. kr. um árið. Við sokallaðu multiplikatoreffektini hevði hetta givið okkum balansa í fíggjarlógina. Henda pening vilja danir heldur enn fegnir lata okkum, men vit siga nei-takk, so heldur lata tey sjúku, tey gomlu og tey veiku vera við sviðið soð.

Men Sigmundur, tak ikki synd í dønum, teir hava ein grundleggjandi sunnan búskap, men tak heldur synd í íslendingum, og so eisini í okkum føringum. Vit eru sterkt á veg at gera sama brølara.

## Skógvarnir eru ov smáir

MARJUS DAM

løgtingsmaður



Vit hava stórar trupulleikar í okkara samfelag í løtuni. Skógvarnir eru ov smáir. Føturnir hava sár og bløðrur. Tað ber illa til at ganga sum er.

Vit mugu hava einar størri skógvar. Einar skógvar, ið klára at ganga og bera kroppin. Uttan at fáa sár.

Vanliga plagar ein samanhangur at vera ímillum støðd av fóti og likami. Men í Føroyum er eingin samanhangur. Tað hevur tað ikki verið seinastu árini.

Orsøkin er politisk og harav fíggjarlig.

Politiskt varð avgerð tikin um at skerja ríkisveitingina í 2002. Fíggjarliga avleiðingin av hesum er, at vit hava mist 4 milliardir krónur at gjalda vælferð fyri. Tann skerjing, ið náttúrliga átti at verið gjørd innan allan tann almenna geiran frá skúlum til sosial og heilsumálaøki sum fylgja av at ríkisveitingin varð skerd, varð ongantíð gjørd av loysingarflokkunum. Tvørturímóti vórðu fleiri krónur nýttar til hesi økir. Tí teir væntaðu at finna olju. Men oljan er ikki funnin enn.

So ei undur í, at skógvarnir eru ov smáir.

Tjóðveldisflokkurin, ið tosaði um rúseitur í smb við blokk, má nú konstatera, saman við sínum veljarum, at hall er á fíggjarlógini, fyrst og fremst orsakað av einum politiskum loysingarrúsi, ið teir stóðu á odda fyri. Vit sita nú eftir við loysingarhallinum. Vit kunnu bert fegnast um, at 2/3 eru eftir av ríkisveitingini. So hava vit tað at gjalda heilsuverk, pensionistar, skúlar o.s.fr. við.

Stóra avbjóðingin ídag er, hvussu vit skulu loysa tann ovurhonds stóra trupulleika, ið Tjóðveldisflokkurin, fyrst og fremst, hevur skapt føroyska samfelagnum.

Um vit vilja tað ella ei, so verður neyðugt at hækka ríkisveitingina aftur. Tí annars er vandi fyri, at fólk aftur í stríðum streymum flytur úr Føroyum. Tí vinnan klárar ikki sum er at gjalda fyri tær tænastur, vit øll krevja skulu verða her á landi. Skógvarnir eru ov smáir. – og teir mugu vaksast.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.